# VIT LEITA EFTIR ÁRSINS LESIÁTAKI

## EIGA TIT BESTA HUGSKOTIÐ?

FØROYAR

Les meira

LESA

NÁM

ÁRSINS LESIÁTAK Á MIÐNÁMI

Kapping

# EIGA TIT BESTA HUGSKOTIÐ?

## VINN 5.000 KRÓNUR

**FØROYAR LESA leitar eftir ársins lesiátaki á miðnámsskúlum. Kappingin hevur til endamáls at eggja ungum at lesa meira.**

## Hvat er eitt lesiátak?

Eitt lesiátak kann vera at at skipa fyri lesiløtum, at framleiða eitt poddvarp um bøkur, at skipa lesibólkar, evnisdagar um yndispersónar úr yndissøgum ella okkurt heilt annað. Bara hugflogið setur markið.

## Hvør kann luttaka?

Kappingin er skipað sum opin kapping fyri allar miðnámsskúlar. Tey luttakandi kunnu til dømis vera flokkar, næmingabólkar, lesibólkar, bókasøvn og onnur.

## Hvussu luttekur mann?

Hvør luttakandi bólkur skal lata inn eina frágreiðing um átakið. Frágreiðingin skal lýsa átakið við orðum, myndum og møguliga filmsbroti. Ynskiligt er, at endamálið við átakinum er greitt, og at næmingarnir hava verið virknir í átakinum.

**Tilfarið skal sendast til foroyarlesa@nam.fo**

## Freist

Freistin at lata inn tilfar, sum lýsir átakið, er 1. apríl 2025.
Vinnarin verður kosin 1. mai.

**Les meira á føroyarlesa.fo**



Í dómsnevndini eru bókavørður, lesivegleiðari og umboð fyri Føroyar lesa.
Øll innkomin hugskot verða savnað í hugskotsbanka hjá Føroyar lesa.